# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Svava Tove Viðberg** fer til gravar úr Matteuskirkjuni, Matteusgade 31, 1666 Keypmannahavn vest, hósdagin kl. 14.

**Dagmar Nolsø Burchard, ættað úr Sumba, búsitandi í Keypmannahavn**, andaðist sunnudagin, 85 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Grundtvigskirkjuni leygardagin 26. septemer kl. 12.

**Dania Nielsen, Tvøroyri,** andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi sunnudagin, 82 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum mikudagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Daniu kunnu lata eina peningagávu til Eldrasambýlið við Sílá. Konta í peningastovnunum.

# Joen Pauli Frederiksen 70 ár

Í dag, 23. september 2009, fyllir Joen Pauli Frederiksen úr Miðvági 70 ár.

Joen Pauli er sonur Elsu Margrethu, fødd Ellefsen, og Edvard Frederiksen (KunoyarEdvard). Hann er næstelstur av 5 systkjum.

Joen Pauli lærdi í smiðjuni hjá Steingrím í Miðvági og fór síðan til Odense at lesa verkfrøði. Heimaftur komin arbeiddi hann hjá JK Joensen & Soni í nøkur ár, umframt at hann eitt skifti var til skips. Hann stovnaði síðani sítt egna virki, har hann m.a. hevur gjørt teymamaskinur til Teymavirkið í Runavík.

Joen Pauli er sera góður handverkari og altíð klárur at hjálpa, hvørt talan so er um motorar, bilar, smíðing o.a., og mangan hevur hann givið okkum eina hjálpandi hond.

Hann hevur sitið í bygdaráðnum



fleiri valskeið, og var harumframt bygda ráðsformaður eitt valskeið. Hann er framvegis limur í bygdaráðnum.

Joen Pauli var giftur við Jónrith, sum var ættað úr Sandavági. Jónrith doyði í apríl í ár, hetta var bæði honum og allari familjuni ein dyggur smeitur.

Børn teirra eru: Arngerð og Marita, sum báðar búgva í Sørvági, og Erhard og Jacob Sonni, sum báðir búgva í Danmark. Abbabørnini eru 6 í tali.

Føðingardagin heldur Joen Pauli í Rødekro saman við børnum og abbabørnum.

Hjartaliga tillukku á føðingardegnum og takk fyri alt, tú ert fyri okkum.

**Ásla og Hans Jacob**

### Dagurin

23. september. Linus, deyður í árinum 79. Var fyrsti eftirmaður Pæturs á pávastóli í Róm. Halgisøgur siga, at hetta er tann Linus, sum nevndur er í 2. Tim. 4, 21, men tað vita teir ikki við vissu. Dagurin eitur eisini heystjavndøgur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

### Prógv:

Nils Kristensen Toftir hevur lokið prógv við sveinastykkið sum bygningsmálari á Tekniska skúla í Aalborg Lærumeistari var Baldvin Baldvinsson

# En pioner siger farvel

Den 1. oktober fratræder Jan á Argjaboða som leder af serviceafdelingen på landssygehuset derfor lige denne hilsen.

En historie vil altid være præget af den der skriver den og det ståsted man har. Mit er en del år som tillidskvinde og nogen år som bestyrelsessmedlem i fagforening.

Jan á Argjaboða er ingienør og den rationalitet der præger faget tog han med sig, da han kom tik serviceafdelingen. Serviceafdelingen er alle os der til daglig tager sig af det praktiske, laver mad, gør rent, vasker tøj og holder huset ved lige.



At den offentlige sektor altid har været under et økonomisk pres og krav om effektivitet, målbarhed og dokumentation er ikke nyt, det der ofte har manglet er ikke bare penge men også viden og vilje til at forandre.

At skulle bryde et indarbejdet mønster op som er blevet en del af virksomhedens kultur, er som regel ikke noget man gør uden at det skaber kraftig modstand, og skal det lykkes, er det et nok en forudsætning at medarbejderne tages med i processen for at forstå formålet. Det har kendetegnet Jan, at han har taget sit personale med og forklaret baggrunden for de forandringer der skulle ske.

Jan blev mødt med tidens krav om mere effiktivitet for færre penge, og hvordan gør man så det? Vi slider elles nok i det. Jans udgangspunkt var at skulle man effektiviserer, måtte der skabes en faglig viden og en oplevelse af at tingene kan gøres anderledes.

Han begyndte med rengøringsafdelingen, og her fik han skabt et samarbejde mellem personalet, fagforening og tillidsfolk med det formål at få dem på AMU-kursus i Danmark og det lykkedes at sende en rengøringsafdeling på 60 folk til Danmark.

At forandre for at bevare det kunne vist godt være være dit motto, der er vel næppe nogen der vil påstå at du er revolutionær.

Du fik plantet en forståelse for, at også ufaglærte har ret til at komme på kursus og at viden kan flyttet tingene må det så give genklang her på Færøerne.

**Tillidskvinden**

# Ókendu Føroyar á Kambsdali



Ingi Sørensen hevur júst latið upp sera forkunnug myndaframsýning, í hølunum hjá Leif Mohr á Kambsdali.

Ingi Sørensen er kavari og hevur tikið hópin av myndum á havsins botni kring Føroyar. Á henda hátt verður latið upp fyri teimum ókendu Føroyum. Ingi sýnir fram 33 stórar og heilt serliga vakrar myndir, umframt at hópin av øðrum myndum frá havsins botni Kring Føroyar, verða sýndar fram á flatskermi.

Leygardagin 26. september, verður tunnilsdagur, í tí sambandi verður opið frá kl 10.00 – 19.00, har ókeypis kaffi, kakao og køkur verða at fáa allan dagin.